# Herferð ímóti mær

**Nýggi Fiskimálaráðharrin, Johan Dahl, skilir ikki skuldsetingarnar um hansara ivasomu fortíð sum stjóri á Vágs Skipasmiðju. Hann sigur seg vera reinsaðan bæði í Frágreiðingini um 80 árini og í samband við skipamálini**

IVASOM FORTÍÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Leitið í 80 ára frágreiðingini, har finna tit nógvar góðar krimisøgur. Nakað soleiðis tók formaður Miðfloksins, Jenis av Rana til, tá málið um Anfinn Kallsberg var í hæddini í desember mánað í fjør.

Um fjølmiðlarnir hava fylgt ráðunum hjá Jenisi skal verða ósagt, men eitt nýtt mál um eina ivasama fortíð spøkir aftur føroyskum politikki. Ivið hevur leingi verið sáddur fortíðina hjá nýggja Fiskimálaráðharranum, Johan Dahl.



*Nýggi landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum, Johan Dahl, skilir ikki skuldsetingarnar um hansara ivasomu fortíð*

*Mynd: Savnsmynd*

Í áttatiárunum var Johan Dahl stjóri á Vágs Skipasmiðju og spurningar hava verið reistir um hansara leiklut í samband við skipasmíð og almenn veðhald.

Útvarp Føroya segði í tíðindunum mánakvøldið, at veðhaldsgrunnurin misti 74, 9 mio krónur upp á Vágs Skipasmiðju í árunum 1988, 1989 og 1990 í veðhaldsútleggum.

## Reinsaður

Johan Dahl sigur seg ikki skilja skuldsetingarnar um hansara ivasomu fortíð. Hann heldur ikki tað tað er rætt at sáa iva um hansara leiklut á Vágs Skipasmiðju.

– Eg var stjóri á Vágs Skipasmiðju og í 1989 fór hon á heysin. Tað er keðiligt at vit mistu pengarnar, men tað var ikki tað stóra, vit kundu gera, sigur Johan Dahl

Johan Dahl fortelur, at hansara persónur bæði er nevndur í Frágreiðingini um 80 árini og í samband við skipamálini, men eingin ákæra varð reist og tí heldur hann ikki tað rætt at sáa iva um hansara leiklut.

Hetta líkist eini hetz ímóti mær. Eg kann standa við tað, eg havi gjørt. Eg havi einki at goyma, tí bæði 80 ára frágreiðingin og skipamálini siga tað sum sigast skal um málini, greiðir hann frá.

## Líkist ikki Anfinni

Í Útvarpi Føroya í gjár kom fram, at serliga Fólkaflokkurin setur spurnartekin við leiklutin hjá Johan Dahl og um hesin er skikkaður til ein landsstýrissess.

Fólkaflokkurin hevur undir samgongusamráðingunum stríðst við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin um at tryggja Anfinni Kallsberg ein landsstýrissess, men bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin søgdu seg ikki hava álit á Anfinni.

Undir samgongusamráðingunum heitti Fólkaflokkurin staðiliga á Sambandsflokkin at taka fyrilit fyri ivasomu fortíðini hjá Johan Dahl, tí fekk fyrrverandi stjórin á Vágs Skipasmiðju ein landsstýrissess, kundi Sambandsflokkurin verða við til at seta samgonguna, løgmann og Johan sjálvan í eina trupla støðu.

Fleiri vilja vera við, støðan hjá Johan Dahl minnir nógv um støðuna hjá Anfinni Kallsberg. Fólk seta spurning við, hvørt Johan Dahl er skikkaður til ein landsstýrissess, tá Anfinn Kallsberg ikki er tað.

Høvuðspersónurin sjálvur hevur onga viðmerking til samanberingina og vísir til formannin í Sambandsflokkinum, sum hevur meldað greitt út, at flokkurin ikki hevur álit á Anfinni Kallsberg.

Hvussu er og ikki, so kann ein róliga staðfesta, at ABC-samgongan ikki fingið bestu byrjanina upp á samgonguskeiðið

# Eidesgaard hevur álit á Johan Dahl

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sigur seg ikki hava nakra orsøk til at halda, at Johan Dahl ikki er skikkaður til ein landsstýrissess. Fólkaflokkurin sigur, at endaliga avgerðin um landsstýrisessin hjá fyrrverandi stjóranum á Vágs Skipasmiðju liggur hjá løgmanni Jóannes Eidesgaard**

IVASOM FORTÍÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fyrsti knúturin í nýggju ABC-samgonguni er veruleiki. Ivasama fortíðin hjá Johan Dahl á Vágs Skipasmiðju spøkir og spurningurin verður reistur um Johan Dahl er skikkaður til at gerast landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Útvarpið Føroya førdi fram mánakvøldið, at veðhaldsgrunnurin misti 74, 9 mio krónur upp á Vágs Skipasmiðju í árunum.



*Fyrsti knúturin í ABC-samgonguni er veruleiki. Ivasama fortíðin hjá Johan Dahl á Vágs Skipasmiðju spøkir. Løgmaður Jóannes Eidisgaard sigur seg kortini hava álit á Johan Dahl sum landsstýrismanni*

*Mynd:*

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, vil ikki gera stórvegis viðmerkingarnar ivasomu fortíðina hjá Johan Dahl.

– Tað stutta av tí langa er, at Sambandsflokkurin hevur mælt til Johan Dahl sum landsstýrismann í fiskivinnumálum og vanlig praksis er at fylgja tilmælunum hjá teimum ymisku flokkunum. Teir hava víst honum álit og eg síggi onga grund til at halda, at hann ikki er egnaður til ein landsstýrissess, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Borðið hjá Eidesgaard

Í Fólkaflokkinum siga teir seg hava ein greiða hugsan um ivasomu fortíðina hjá Johan Dahl. Flokkurin vil kortini ikki siga, hvør støðan er, men vísir til løgmann Jóannes Eidisgaard, sum hevur seinasta orðið í málinum. – Jóannes Eidesgaard má gera av um somu reglur sum galda fyri Johan Dahl sum Anfinn Kallsberg, sigur Óli Breckmann.

Fólkaflokkurin hevur ikki viðgjørt málið innanhýsis, men bíðar eftir støðuni hjá Jóannesi Eidesgaard í málinum.



# Burtur úr vón og viti

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, er sera harmur um, at Almannaráðið og Heilsumálaráðið verða løgd saman aftur. Hann skjýtir upp, at ráðini framhaldandi verða tvey í tali, men við einum landsstýrismanni**

SAMANLEGGING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Samanleggingin er burtur úr vón og viti. Fyrrverandi landsstýrismaðurin í familjumálum, Bill Justinussen er sera harmur um, at Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava avgjørt at leggja Heilsumálaráðið saman aftur við Almannaráðnum.

Miðflokkurin heitti í farnu viku á umboðini í ABC-samgonguni um at umhugsa samanleggingina, men uttan úrslit. Samgongan hevur avgjørt, at aðalráðini fækka úr níggju niður í sjey og at Almannaráðið og Heilsumálaráðið leggja saman aftur.



*Fyrrverandi landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, er harmur um, at Heilsumálaráðið fer í søguna. Hann skjýtir upp sum eina neyðloysn, at ráðini framhaldandi verða tvey í tali, men einum landsstýrismanni*

*Mynd: Savnsmynd*

## Verri tænasta

Bill Justinussen rør frammundir, at játtanin á fíggjarlógini til almanna- og heilsu økið er so stór, at borgarin hevur krav um eina góða tænastu á økinum. Javnan verður ført fram, at almenna fyrisitingin skal gerast so einfald sum gjørligt.

Hesum er Bill Justinussen samdur í, men hann heldur ikki, at ein samanlegging av Almannaráðnum og Heilsuráðnum ger fyrisitingina einfaldari – heldur tvørturímóti.

– Mann tosar um at gera alt einfaldari. Føroyska samfelagið er alt annað enn einfalt og tí er neyðugt við eini sterkari fyrisiting við nógvum góðum útbúnum fólki, tí nógv orka skal til at fyrisita økið, sigur Bill Justinussen.

Við at leggja ráðini saman aftur, væntar Bill Justinussen, at fleiri mál detta niður í millum, tí arbeiðstrýstið verður ov stórt, og hetta heldur hann verða sera harmiligt.

## Spilt tíð

Seinastu tvey árini hava embætisfólk hjá Bill Justinussen í Heilsumálaráðnum sett nógva tíð og orku av til at menna Heilsumálamáláráðið sum sjálvstøðugt ráð eftir, at undanfarna samgonga gjørdi av at býta Almanna- og Heilsumálaráðið sundur.

Bill Justinussen er ógvuliga harmur um, at rúgvusmikla embætismannaarbeiðið nú nærmast fer fyri skeytið.

– Vit hava tikið eitt stórt tak fyri at menna Heilsumálaráðið sum eitt sjálvstøðugt ráð. Nú skal mann aftur brúka tíð til at koyra ráðini saman aftur, og tað er nógv tíð og orku sum kundi verið nýtt øðrvísi, greiðir Bill Justinussen

*Kemur Miðflokkurin í samgongu aftur, verða so ráðini skild aftur?*

Tað veit eg ikki. Tað skapar stóra ónøgd millum fólkið, sum starvast í ráðunum, um tey enn einaferð skulu í holt við at umstilla seg til at verða tvey ráð. Eg haldi persónliga, at samanleggingin er burtur úr vón og viti. Sum eina neyðloysn skjóti eg upp, at ráðini framhaldandi verða tvey í tali, men við einum landsstýrismanni, sigur Bill Justinussen fyrrverandi landsstýrismaðurin í heilsumálum at enda.

# Atlantsflog samstarvar við Austrian Airlines

**Atlantic Airways og eysturíkska Austrian Airlines samstarva um flúgving**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Atlantic Airways og eysturíkska tjóðarflogfelagið Austrian Airlines eru farnir at samstarva innan flogferðlu. Nøkur flogfør hjá Austrian Airlines vóru herfyri tikin úr flúgving í eitt tíðarbil, og eysturíkarar hava tí leigað m. a. Atlantic Airways at flúgva fyri seg. í tvær vikur.

Annað av flogførunum hjá Atlantic fór við tveimum manningum til Wien í gjár, og skal hagani flúgva fyri Austrian Airlines í Europa. Flogfarið hjá Atlantic var eisini mesta partin av síðstu viku í flúgving fyri eysturríkska felagið og fleyg úr Wien til ymsar europeiskar býir, so sum Athen, Brússel, London, Milano og Nice.




*Hans Meinhard á Høgabóli, flogskipari hjá Atlantsflog, á veg í flogfarið á flogvøllinum í Nice*

– Tað hevur stóran týdning fyri felagið at fáa slíkar uppgávur, tí tað er eitt gott íkast til raksturin í lágárstíð, sigur Magni Arge, stjóri.

– Men tað er eisini eitt herðaklapp og ein viðurkenning til øll tey, sum hava lagt rygg til at menna føroyska flogfelagið, at eitt altjóða flogfelag í Star Alliance samtakinum setir sítt álít á føroyska felagið á henda hátt, sigur Magni Arge.

Flogfarið hjá Atlantic verður aftur í Føroyum fríggjamorgunin.